# Fer nú av álvara at kappast við bankan

**Á nýggjárinum verður Føroya Sparikassi umskipaður til partafelag. Samstundis verður stovnaður ein grunnur við 640 milliónum krónum. Teir 6.000 ábyrgdararnir fáa møguleikan til at gera ábyrgdarapeningin til partapening**

PENINGASTOVNAR
*Áki Bertholdsen*




*Nú skal eisini Føroya Sparikassi umskipast til eitt partafelag. Ein grunnur við 640 milliónum í, skal eiga næstan allan partapeningin, men hesin grunnurin skal eisini kunna keypa partar av øðrum fyritøkum, og seta pening í vinnulívið*

Kappingin í føroyska fíggjarheiminum harðnar alsamt. Og á nýggjárinum verður hon enn harðari.

Á nýggjárinum verður Føroya Sparikassi nevniliga umskipaður til eitt partafelag og tað fer at fáa merkjast í føroyska fíggjarheiminum.

Tá ið Sparikassin er blivin partafelag, er ætlanin í størri mun at taka kappingina upp við Føroya Banka.

Hvussu viðskiftafólkini koma at merkja broytingina vil leiðslan í Sparikassanum ikki siga enn.

Petur Zachariassen, nevndarformaður, sigur, at Sparikassin er enn ikki til reiðar at avdúka smálutir í ætlanini, ella, hvussu Sparikassin ætlar at taka dystin upp við bankan, men hann viðgongur tó, at tað er eitt endamál við broytingini at gera Sparikassan sterkari í kappingini við Bankan.

Men við broytingini fer bygnaðurin í Sparikassanum eisini at broytast. Eitt nú er tað teir 49 limirnir í umboðsráðnum, sum nú velja nevndina, eftir broytingina verða tað allir partaeigararnir, sum fáa høvi at møta á aðalfundi at velja nevndina.

Tó er ætlanin at halda fram við umboðsráðnum, áleið, sum vit kenna tað í dag. Eftir nýggju skipanini kunnu allir partaeigarir, sum eiga minst 1% av partapengunum, velja limir í eitt umboðsráð.

### 640-millióna grunnurin

Kortini skilst á øðrum keldum í sparikassanum, at partapeningurin í nýggja Sparikassanum verður umleið 650 milliónir, sum er eginpeningurin hjá stovninum.

Teir 6.000 ábyrgdararnir í sparikassanum eiga umleið 11 milliónir og teir fáa nú høvi til at gera ábyrgdarapeningin um til partapening, men teir fara at fáa gott virði í partabrøvum fyri ábyrgdarapeningin.

Harafturat er ætlanin at stovna ein sjálveigandi grunn við teimum 640 milliónunum, sum nú eru eftir av eginpeninginum.

Av tí, at grunnurin verður størsti eigarin í sparikassanum, verður tað eisini hann, sum fær tað mesta vinningsbýtið.

Umframt at eiga partapening í Sparikassanum, skal hesin grunnurin eisini kunna seta pening í vinnulívið ella gera íløgur í onnur virki, og keypa partar í ymsum fyritøkum.

Eitt nú hevur onkur nevnt møguleikan fyri, at hesin grunnurin fer at keypa partabrøv í ymsum almennum fyritøkum, tá ið tær verða privatiseraður, ella einskildar, sum nú eitur á føroyskum.

Hesin sami grunnurin skal altíð verða høvuðspartaeigari í Sparikassanum, men møguliga verða partabrøv eisini seld.

Tó er ætlanin at seta tað avmarking á, at ongin, uttan grunnurin sjálvur, skal kunna eiga meiri enn 10% av partapengunum.

Men eitt nú kann grunnurin, tá ið hann keypir ein part av øðrum fyritøkum, gera serligar avtalur við tað fyritøkuna um, at at hon kann fáa upp til 25% av partapengunum í Sparikassanum.

# Glapp á stokkinum

**Næstan alt var komið undir land, tá ið samráðingarnar ímillum kommunurnar og Starvsmannafelagið slitnaðu, sigur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Ímillum 400 og 500 starvsfólk hjá átta kommunum kring landið hava nú lagt arbeiðið niður. Harumframt er dagrøktin í Havn, Klaksvík, Sørvági og á Skála, løgd lamin*

– Vit harmast um, at tað endaði við verkfalli. Men vit halda ikki, at Starvsmannafelagið hevur tikið neyðug atlit tey serligu viðurskifti, sum eru galdandi í kommununum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, heldur, at orsøkin til verkfallið, sum nú er í átta kommunum kring landið, er ein avleiðing av, at Starvsmannafelagið ikki vísti neyðugt forstáilsi.

Men tað skilst, at tað var komið heilt á stokkin, tá ið samráðingarnar slitnaðu.

Felagið sigur, at partarnir hava í longri tíð arbeitt við at innplasera eina nýggja lønartalvu, sum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið gjørdu fyrr í ár.

– Nú samráðingarnar slitnaðu, vóru bara einar átta innplaseringar eftir av teimum 300-400.

Harumframt hava partarnir í langa tíð roynt at samanskriva sáttmálan ímillum Fìggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, so at hann eisini kundi verða galdandi fyri kommunurnar.

– Nú samráðingarnar slitnaðu vóru bara onkrar smávegis orðingar eftir, umframt nakrir ígjøgnum mong ár innarbeiddir sersáttmálar fyri kommunala økið.

Arbeiðsgevarafelagið hjá kommununum metir, at semja var fingin um ímillum 96 og 99% av viðurskiftunum, tá ið tað skrædnaði

### Dagrøktarar trupulleikin

Felagið sigur at stóri trupulleikin vóru viðurskiftini hjá dagrøktarunum.

– Fyri tveimum árum síðani batnaðu teirra viðurskifti so nógv, at tað dýrkaði dagrøktina 25%, men av teimum betala foreldrini 30%.

Í hesum samráðingunum kravdi Starvsmannafelagið, at dagrøktarir skulu hava somu sømdir sum onnur kommunal Starvsfólk, eitt nú fulla løn undir sjúku og barnsburði, eisini skattafría samsýningin, sum er 1/3 av lønini.

– Tað vóru serliga hesi viðurskifti sum gjørdu, at samráðingarnar slitnaðu.

Hinvegin halda kommunurnar, at dagrøkt er ein serlig skipan, har dagrøktir arbeiða sjálvstøðugt við og har barnatalið hjá hvørjari dagrøkt er ymiskt.

Arbeiðsplássið er heima og tað ber ikki til at hava sama eftirlitið við arbeiðstíðini, sum við vanligum skrivstovufólki.

Tí er hetta ikki eitt øki, sum er hóskandi at skipa eftir vanligum starvsmannareglum, heldur kommunala Starvsmannafelagið.



# Fulltrúi í Havn var ein stórur trupulleiki

**Stóri trupulleikin var, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið setti ein fulltrúa úr Havn at leiða hesar samráðingar, sigur Starvsmannafelagið**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Stóri trupulleikin í hesum samráðingunum var, at nú tað var fyrstu ferð, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, skuldi samráðast um sáttmála, setti tað ein fulltrúa úr Kommunalu umsitingini í Havn at standa á odda fyri samráðingunum.

– Hann hevur ongantíð áður staðið fyri samráðingum fyrr og hevur tað merkti eisini samráðingarnar.

Tað er niðurstøðan hjá Starvsmannafelagnum, nú samráðingarnar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið slitnaðu á miðdegi leygardagin.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum vil ikki enn útgreina, hvat felagið hugsar um.

Men Starsvsmannafelagið sigur, at størsti trupulleikin var, at umboðini frá Tórshavnar kommunu bert hava samráðst út frá síni egnu kommunalu áskoðan og tí slitnaðu samráðingarnar.

Annars sigur Starvsmannafelagið, at frá fyrsta degi vóru partaranir samdir um at grundalagið undir sáttmálanum skuldi verða semjan, sum Starvsmannafelagið gjørdi við Fíggjarmálastýrið 8. apríl í ár. Fyrstu tíðina var arbeitt við at tillaga kommunalu størvini til lønartalvuna við Fíggjarmálastýrið. Hetta tók drúgva tíð og tá komið varð á mál við hesum seinnapartin í august, vísti tað seg at restin av sáttmálatillagingin ikki lat seg gera.

Tí vórðu boð send eftir semingsmonnunum.

Tað vísti seg eisini at umstøðurnar hjá starvsfólkunum hjá Tórshavnar kommunu, eru verri enn umstøðurnar hjá hinum kommununum og í restini av almennu umsitingini og hetta var eisini tað, sum lá í buktini, nú semingsmennirnir góvust við royndunum.

Partarnir vóru samdir um at laga allar kommunalu sáttmálarnar eftir nýggja sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið, men mugu vit nú endaliga staðfesta, at Tórshavnar kommuna ikki er búgvin til tað og tí hava allir limirnir hjá Starvsmannafelagnum í átta kommunum, sum felagið hevur sáttmála við, fingið boð um at leggja arbeiðið niður.

Kommunurnar, sum eru raktar av arbeiðssteðginum eru Tórshavn, Klaksvík, Tvøroyri, Vágur, Runavík, Fuglafjørður, Skála og Sørvágur.

Sostatt liggur alt umsitingarligt arbeiðið hjá hesum kommununum lamið. Harumframt er dagrøktin í Tórshavn, Klaksvík, Skála og í Sørvági hildin uppat. Hetta eru tær kommunurnar, sum Starvsmannafelagið hevur dagrøktarsáttmálar við.

Men nøkur undantøk í sambandi við neyðsynjararbeiði eru gjørd.

Tilsamans er talan um 400 - 500 fólk, sum ikki eru farin til arbeiðis.

# Fartelefon gevur falska trygd á sjónum

FARTELEFONIR
*Annika Joensen, praktikantur*



Í einum donskum blaði stendur, at stjórin á Lyngby Radio er óróligur, tí fleiri frítíðsfiskarar keypa fartelefon, ístaðin fyri VHF radio fyri at spara pening. Hann sigur, at tað er við at vera ein trupulleiki, tí at tá fiskarin ringir við fartelefon, er signalið onkuntíð so ringt at teir hoyra ikki hvat verður sagt, og battaríið kann brenna út, áðrenn hann hevur sagt frá, hvar hann er staddur. Á tann hátt er tað ógvuliga torført hjá bjargingartænastuni at finna frítíðsfiskaran.

Fyri at gera tað eitt sindur lættari hjá bjargingartænastuni, spyr Lyngby Radio fyrst hvar fiskarin er staddur, tí so vita teir hvar teir skulu leita, um okkurt hendur við fartelefonini.

– Ein fartelefon sum einasta samskiftisamboð er ikki nóg mikið av tryggleika, sigur strandaútvarpsstjórin á Lyngby Radio, Knud Holdgaard.

Danska bjargingartænastan heldur tó at okkurt gott er við at hava fartelefon. Til dømis eru minni óneyðugar bjargingaraktiónir settar ígongd, tí nú kann familjan ringja til frítíðsfiskaran, ella hann sjálvur ringir heim, um hann er seinni heima enn væntað.

Trupulleikin er ikki komin til Føroyar enn, men tó er tað onkur, ið nýtir fartelefon, ístaðin fyri VHF radio, og tað er ikki loyvt. Fartelefon er ikki góðkend sum samskiftisamboð í Føroyum, tí í lógini stendur at bátar, ið eru størri enn eitt 8 mannafar, skulu hava VHF radio umborð. Hetta sigur Jóhann Simonsen frá Vaktar og bjargingartænastuni.

Kartni Fornagarð, tøknikari hjá Føroya Tele, sigur, at enn hevur eingin trupulleiki verið av at fiskarar brúka fartelefon, sum hann veit um. Hann sigur eisini, at tær nýggju telefonirnar eru eitt sindur betri enn tær gomlu, tí at tær gomlu eru slitnar og battaríið nógv brúkt. Tá tær vera eldri og slitnari brúka tær eisini meira orku, tá ið tú ringir og eisini tá fartelefonin skal finna eitt signal.



*Borðini standa tóm á havnarskrivstovuni, nú havnarfútar og skrivstovufólk eru í arbeiðssteðgi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Í oyðini høll

**Hann situr so eina og hyggur niður á havnarlagið á Skansabryggjuni, havnarstjórin á Tórshavnar Havn, nú havnarfútarnir eru í arbeiðssteðgi**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Edvard Joensen*

Havnarstjórin í Havn gongur einsamallur saman við einum verkfrøðingi á Havnarskrivstovuni, nú havnarfútarnir og skrivstovufólkini eru í arbeiðssteðgi saman við hinum limunum hjá Starvsmannafelagnum, sum høvdu sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Jónsvein Lamhauge, havnarstjóri, sigur, at tað hava ikki verið tær stóru avleiðingarnar av arbeiðssteðginum enn, annað enn at telefonin verður ikki tikin so væl sum vanligt, og helst ikki eftir vanliga skrivstovutíð. Hann er einsamallur á vaktini og kann ikki gera annað arbeiði enn tað, hann vanliga plagar at gera.

Skip, sum vilja hava samband við Tórshavnar Havn, fara at hava truplari við tí, meðan stegðurin er. Og tað kann so enda við, at tey kanska fara framvið og fáa sær tænastur aðrastaðni, sigur havnarstjórin í Havn.

– Tað kann so gera, at vit missa inntøkur, tí vit ikki fáa latið tær tænastur, skipini vilja hava, sigur hann.

Tær tænastur, hann tosar um, eru slíkar sum at fáa vatn, olju og annars fáa bryggjupláss í havnini.

– Nú er tað so, sigur Jónsvein Lamhauge, at havnirnar hava móttøkuskyldu, og tí ber ikki til at koyra skip útaftur, sum hevur hug at koma til Havnar. Men skipini mugu so sjálv finna sær bryggjupláss, um tey koma, meðan eingin er á vakt. Og er tað eitt stórt skip, har tú ikki bara loypur av lúnningini inn á bryggjuna, kann koma at standa á at fáa endan fastan. Eisini kann tað fara at knípa at fáa loðs, um biðið verður um tað.

Tórshavnar Havn umfatar eisini Kollafjarðar Havn, har havnarfútin eisini er í arbeiðssteðgi.

Annars gongur alt eftir øllum at døma sína vanligu gongd hendan tunga mánamorgunin. Strandfaraskipini sigla, og farmaskipini lossa.

Tað regnar uttanfyri, og videoskíggin, sum vísir á høvuðsinngongdina niðri við bryggjuna, er kámur av dropum, síggja vit, tá vit koma inn í vaktstovuna á ovastu hædd í bygninginum, har Skipafelagið og Tórshavnar Havn húsast.

Ein annar skíggi stendur tendraður á borðinum. Ein telduskíggi, har eitt kort yvir Nósloyarfjørð og landið rundan um er á. Har er radarmyndin frá radaranum hjá havnarskrivstovuni eisini flutt yvir á, so til ber at síggja myndina inni á sjálvum kortinum. Sera praktiskt sanna vit, meðan vit á skíggjanum eygleiða Smyril, sum fer suður gjøgnum fjørðin og møtir Rituni nakað innanvert Glyvursnes. Ritan kemur norður eftir nærri landinum, og vit fylgja teimum, meðan tey flyta seg á skíggjanum.

Undir vindeyganum liggur Lómur og lossar. Hann er komin úr Danmark, og har gongur alt sína vanligu gongd.

Nei, enn merkir havnarstjórin einki til arbeiðssteðgin sum so. Men tað kann verða so skjótt, heldur hann og fer at taka telefonina, sum aftur er farin at ringja.